tíðindablaðið
**sosialurin**
frælsi
javnaður
brøðralag

*Nr. 72* ★ *Týsdagur 27. juni 1989* **62. árg ★ kr. 6.00**

# Sabrina — eitt stórt
# TVØRBALL

*Sabrina - ein tvør dama*



á siðu 3

*Mynd: Kaj Kyllesbæk*

*Fólk bíðaðu í heilar tríggjar tímar eftir Sabrinu. Fyrsta hon gjørdi, tá hon fekk mikrofonina, var at geva strandingum skyldina.*

*Stranda Ítróttarfelag hevði undirskot av konsertini. M.a. tí at millum 200 og 300 følsk atgongumerki vóru seld. Tað skal Sabrina tó ikki hava skyldina av.*

# Ótrúligt!



*Mynd: Diml./tó.mi.*

VB-leikararnir trúðu ikki teirra egnu eygum, tá teir sóu KÍ koma á vøllin norðuri í Klaksvík sunnudagin: ikki ein einasti av 1. deildar-leikarunum higartil var millum teir bláu. Tí 1. liðs-hópurin sat á áskoðara-plássunum!
Tað hava verið stórir innanfelags-trupulleikar á 1. liði KÍ, og fríggjakvøldið kravdu umboð vegna 1. liðs-hópin, at venjarin Manne Høgnesen var loystur úr starvi frá og við VB-dystinum og at annar navnnevndur varð settur at standa fyri hesum dysti. Nevndin í fótbólts-deild KÍ's vildi ganga við til, at John Sigurð Joensen, hjálpar- og 4. deildar-venjari sum ein millumgongu-loysn varð settur at standa fyri hesum dysti og møguliga komandi vikuskifti við. Men 1. liðshópurin setti uppá sín egna kandidat, og so sendi John Sigurð Joensen eitt tiltaks-lið at skifta. Klokkan var farin av 14.30.
Og nýlingarnir fóru inn og bastu einum av oddaliðunum við tveimum málum ímóti ongum ímóti vágbingum, sum roknaðu sær lættan sigur, sum so hevði verið tann fyrsti VB-sigurin hjá VB í Klaksvík síðani seinast í 30'unum frættist.
Greiða skal fáast á ósemjuni í Klaksvík í hesi vikuni, og vit fara at fregnast og vóna at hava okkurt haðani til hósdags-blaðið.
Í Gundadali skiftu oddaliðini B 71 og HB stigini sínamillum í einum tekniskt góðum, men javnt keðiligum dysti, ið endaði málleysur. Inni á Svangaskarði kom B 36 niður aftur á jørðina, tí Ingemar Højgaard sendi liðið suður til høvuðsstaðin við einum 0-2 ósigri. Fuglfirðingar eru uppsteðgaðir: GÍ vann 0-2. Og í Sandavági sendi SÍF-venjarin, lorvíkingurin Páll Joensen Tórfinn Hansen og aðrar vinmenn aftur til Lorvíkar við ongum stigi: 4-2 til SÍF.
Í aðru deild fingu øll trý oddaliðini - NSÍ, MB og TB - fult fyri teirra dystir. Í einum av dystinum máttu out sidararnir úr GÍ lúta fyri MB.

## *Fyrsti »arbeiðsdagur« hjá búskaparmálaráðharranum:*

á siðu 3

# Summarfrí í Skotlandi



*Jóngerð Purkhús, búskaparmálaráðharri út at ferðast á sínum fyrsta arbeiðsdegi í landsstýrinum.*

*Sabrina — eitt stórt*

# TVØRBALL



Mynd: Kaj Kyllesbæk

Sabrina kemur her úr flogfarinum saman við fylgi. Hon hevði tjúgu fólk við sær.

***Fólk bíðaðu í heilar tríggjar tímar eftir Sabrinu. Fyrsta hon gjørdi, tá hon fekk mikrofonina, var at geva strandingum skyldina.***

***Stranda Ítróttarfelag hevði undirskot av konsertini. M.a. tí at millum 200 og 300 følsk atgongumerki vóru seld. Tað skal Sabrina tó ikki hava skyldina av.***

Kemur heimskenda sangarinnan Sabrina aftur til Føroya verður tað ikki sum gestur hjá Stranda Ítróttarfelag. Teir høvdu nevniliga ógvuliga ringar royndir av henni.

Upprunaliga skuldi hon verið í Føroyum næstseinasta leygardag, men hesum forðaði mjørkin fyri, og mjørkanum kunnu hvørki Sabrina ella fyrireikararnir á Strondum gera við. Strandingar fingu síðani, eftir tógvið stríð, nýggja avtalu við Sabrinu. Hon skuldi komu sunnudagin og hava konsert í ítróttahøllini á Skála sunnukvøldið klokkan átta.

Teir umleið 1500 áhoyrararnir møttu sum vera man stundisliga at hoyra og kanska ikki minni at síggja heimskendu sangkvinnuna, men tey komu at bíða leingi. Ætlanin var, at konsertin skuldi byrja við, at føroyska orkestrið Kontrast skuldi hita upp í umleið hálvan tíma áðrenn Sabrina slapp framat, men heldur ikki manningin á Kontrast kom á pallin. Orsøkin var, at Sabrina hevði kravt, at hennara tónleikarar skuldu gera ljóðroyndir frammanundan, og teir komu ikki fyrr enn um hálvguntíggjutíðina. Sostatt sluppu Kontrast ikki framat fyrr enn klokkan var út ímóti tíggju.

Men enn var eingin Sabrina at síggja. Ikki fyrr enn um ellivutíðina kom hon, og tær upplivingar, sum strandingar ikki høvdu havt av henni áður, fingu teir tá.

Tað fyrsta Sabrina gjørdi eftir at hava fingið mikrofonina í hondina var at skýra ein av fyrireikarunum, Símun E. Rasmussen, fyri heimsins vánaligasta vert. Tá hon umsíður var liðug at býta "lúsingar" út millum strandingar kundi sjálv konsertin byrja, og hon var góð, verður sagt.

## Eitt stórt tvørball

Símun E. Rasmussen sigur, at hann uttan nakrar trupulleikar kann liva við ummælinum frá Sabrinu. Hetta hevur minni at siga, men trupul var hon at fáast við, leggur hann aftrat.

-Upprunaliga avtalan var, at Sabrina skuldi heintast á Hotel Borg klokkan hálvgun átta so hon kundi vera á Skála tá Kontrast vóru lidnir við sín part av konsertini. Men hon tóktist at gera seg sera tvøra. Tað var eitthvørt í sáttmálanum sum hon knappliga var illa nøgd við, og hon fekst ikki av hotellinum fyrr enn langt um leingi, sigur Símun E. Rasmussen. Hann leggur aftrat, at tað ikki bert hevur verið her í Føroyum, at hon hevur verið tvør. -Danin, sum skipaði fyri rundferð hennara í Skandinavisku londunum segði seg ikki vita um tílíkar tvørleikar fyrr við nøkrum konsertum ella sangarum. Hann var ovurfegin um, at hendan konsertin var hin seinasta hann hevði nakað við at gera, sigur Símun. Hann leggur aftrat, at hetta er í hvussu er seinastu ferð hann vil hava nakað við Sabrinu at gera.

## Følsk atgongumerki

Konsertin gekk heldur ikki gott í aðrar mátar. Stranda Ítróttafelag, sum vónaði og væntaði at hava nakrar krónur liggjandi eftir í kassanum eftir konsertina má nú sannað, at konsertin gav eitt hampuligt hall. Ein av orsøkunum er, at konsertin ikki kundi vera sum upprunaliga ætlað næstseinasta leygarkvøld. Ein onnur orsøk er, at millum 200 og 300 følsk atgongumerki vóru seld við dyrnar tá konsertin skuldi byrjað.

Talan er um nógvar pengar. Roknað verður við, at selt hevur verið fyri einar 50.000 krónur í følskum atgongumerkjum.

Símun E. Rasmussen sigur, at teir vita ikki hvør hevur gjørt følsku atgongumerkini, men hann heldur seg vita hvaðani úr landinum tey koma. Hetta var kanska júst tað, sum manglaði í hjá ítróttafelagnum at fáa tiltakið at standa seg.

tór.-

---

*Fyrsti »arbeiðsdagur« hjá búskaparmálaráðharranum:*

# Summarfrí í Skotlandi



*Jóngerð Purkhús, búskaparmálaráðharri út at ferðast á sínum fyrsta arbeiðsdegi í landsstýrinum.*

Fyrsti arbeiðsdagurin hjá nýggja landsstýrinum var í gjár og sín fyrsta landsstýrisfund hevði nýggja manningin í Tinganesi klokkan týggja í gjáramorgunin. Men nýklakti búskaparmálaráðharrin var ikki við á fundi.

Meðan hinir landsstýrismenninir hittust fyri at tosa um hvussu nú skuldi farast til verka, hvussu kundi sparast, hvussu inntøkulógirnar, sum landsstýrið hevur ætlanir um at leggja fyri tingið í vikuni, skulu formast o.s.fr. hevur búskaparráðharrin, Jóngerð Purkhús, pakkað sítt summartoy í sjáttuna og er farin til Skotlands at halda summarfrí. Úr landsstýrinum verður sagt, at hon verður aftur um eina viku.

Sum skilst hevur okkara búskaparmálaráðharri lítlan áhuga í teimum inntøkulógaruppskotum sum landsstýri hennara arbeiðir við í løtuni og fer at leggja fyri tingið áðrenn hon er komin aftur.

Allir samgongutingmenninir eru ikki so sera erpnir av tí stóra áhuga, sum búskaparmálaráðharrin tykist at vísa fíggjarviðurskiftum landsins í hesum teir kalla krepputíðum. Onkur teirra helt fyri, at betur var, at hon sat heima og spardi heldur enn at fór út at brúka.

## Tordur ikki á fundi

Tað hevur ljóðað, at landsstýrismaðurin hjá Kristiliga Fólkaflokkinum ætlaði sær á landsstýrisfund í gjáramorgunin, men so var ikki, hóast pláss ivaleyst hevði verið fyri honum nú Jóngerð ikki er til arbeiðis. Tordur Niclasen hevur tó ikki sagt seg úr landsstýrinum enn.

- Á landsstýrisfundinum var sum sagt tosað um inntøkulógirnar, men enn er ikki greitt, nær hesar verða lagdur fyri tingið. Sagt verður, at tað verður helst í seinru helvt av vikuni.

tór.-